

Arthur Tsjilingarov, serligur ráðgevi hjá russiska forsetanum Vladimir Putin.

# Russar hótta við at útihýsa norskum oljufeløgum

**Jógvan Hugo Gardar**

21.12.2014 - 12:55

Oljan.fo

ES setti í heyst í verk tiltøk í verk móti Russlandi, tí ES metti at Russland hevur ábyrgdina av brotum á fólkarættin í Ukraina. Stutt aftaná gjørdi Noreg tað sama.

Tiltøkini eru sett í verk móti russiskum bankum, verju- og oljuídnaðinum. Harafturat hava 24 navngivnir persónar fingið bann móti at vitja í ES, Noregi og øðrum londum sum hava sett í verk somu tiltøk.

NRK skrivar at bannið hevur rakt norskt vinnulív meint, tí nógv samstarv er millum norska vinnulívið og russiska, serliga í Norður-Noregi og Murmansk-økinum.

Men nú kann støðan gerast enn verri. Sambært NRK hótta russiskir myndugleikar nú við at norsk oljufeløg ikki sleppa at luttaka í kappingunum um stórar oljuverkætlanir.

Noreg er tað landið í Evropa sum missir mest av handilsbanninum sum nú er galdandi báðar vegir.

Arthur Tsjilingarov, serligur ráðgevi hjá russiska forsetanum Vladimir Putin, vitjaði hósdagin í Oslo. Hann hevði eina ávaring við sær í ferðagóðsinum:

- Um handilstiltøkini halda fram, so noyðast vit at leita eftir øðrum samstarvsfeløgum. Og tað eru nógv sum ynskja at samstarva við okkum, og bjóða seg fram, til dømis úr Kina, Suður-Korea og øðrum londum, segðiTsjilingarov í samrøðu við NRK.

Russiskir myndugleikar heita nú á Noreg um at hugsa um seg sjálvt, og ikki gera alt sum ES og USA siga.

- Tað er keðiligt at Noreg, ið vit hava eitt gott samstarv og grannalag við, velur at luttaka í hesum handilstiltøkunum. Tiltøkini koma ikki at steðga okkum. Vit eru eitt fólk sum hyggja norðureftir, og vit eru eitt treikst fólkaslag. Vit eru ikki bangin fyri einum køldum kríggi, segði Tsjilingarov.

Fyri Noreg er støðan serliga trupul fyri tríggjar vinnur. Talan er um ferðavinnuna, oljuvinnuna og sjøgætisvinnuna, ið hava mist nógv av tiltøkunum.